# Varliga bjartskygdir

**- Vit halda okkum hava gjørt okkara heimaarbeiði men vilja eisini vera realistiskir, tí siga vit, at vit eru varðliga bjartskygdir sigur Richard Hardman hjá Amerada Hess, sum tó ikki sær ein turran brunn sum nakra vanlukku. So mugu teir fara aftur til tekniborðið og stinga út í kortið av nýggjum**

OLJULEITING
*Jan Müller*



*Ben Arabo, stjóri hjá Amerada Hess í Føroyum saman við Steve Boldy, nýggja stjóranum hjá Hess í Norðureuropa og Richard Hardman, sum herfyri segði Føroyum farvæl við ynskinum um góða eydnu*

*Mynd jan*

Í hesum døgum hevur oljusamtakið The Faroes Partnership við Amerada Hess, Dong, British Gas og Atlants Kolvetni borað góða helvt av brunninum Marjun suðuri á landgrunninum. Boringin byrjaði 20. september og skulu borast knappir 4000 metrar. Enn er einki likið út um boringina, men Sosialurin skilur, at spenningurin er serliga stórur júst í hesum døgum, tí borurin skuldi koma niður á eitt av mongu málunum í brunninum, tó at tað ikki er sjálvt høvuðsmálið.

Stutt áðrenn boringin byrjaði vórðu fleiri av oddamonnunum hjá Amerada Hess á vitjan í Føroyum. Millum teirra vóru Steve Boldy, sum herfyri tók við sum leitingarstjóri hjá Amerada Hess í norður og vestur Europa. Hann tekur sær av leiting í Norra, Danmark, Bretlandi og nú eisini Føroyum og tók við eftir Jan Evensen, sum í november í fjør tók við starvi í Vietnam. Steve Boldy vitjaði í Føroyum herfyri í sambandi við at Richard Hardmann, ein av veteranunum í felagnum, fór frá sum altjóða leitingarstjóri hjá Amerada Hess.

Sosialurin tosaði við teir báðar.

Steve Boldy er rættiliga bjartskygdur um boring teirra á landgrunninum. Prospektið hjá Hess er øðrvísi enn tað hjá hinum feløgunum, men dýpið minnir um tað hjá Statoil.

Hóast Statoil og BP bora turrar brunnar, so heldur Steve Boldy ikki, at tað hevur stórvegis ávirkan á teirra prospekt. –Tað broytir ikki vónir okkara til at gera eitt fund, tí okkara leitimodell er øðrvísi við einum stórum sjálvstøðugum strukturi í undirgrundini. Hóast brunnarnir hjá Statoil og BP eru í sama øki, so liggja teir kortini nakað frá Marjunbrunninum. Steve Boldy vísir á, at tað stutt frá tí strukturinum teir eru eftir, finnast kolvetnisspor á bretskum øki. –So hvat enn spyrst burtur úr hjá hinum, so fer tað á ongan hátt at broyta okkara meting av møguleikanum at gera fund.

- Ikki fyrr enn tú veit, hvør "Playtype" - slag av leitimodelli - virkar, so fær tú góð úrslit. Tá Foinaven varð funnið riggaðu nærum allar boringarnar eftir tað. Vit vita ikki, hvat slag av "playtype" riggar í Føroyum. Men fyri okkum er tað sera avgerandi, at teir næstu brunnarnir vísa tekin til olju og gass, so vit halda at her finst ein virkin oljuskipan. Vit vita bara ikki, hvat slag av fellum kann brúkast ella riggar í føroyskum øki. Vit hava gjørt okkara forarbeiði út frá tí playtype, sum hevur verið brúkt í bretska partinum, men tað kann vera, at tað ikki riggar her.

Vit bora ein brunn av tí "gamla klassiska slagnum". Hetta er ikki tað slagið sum t.d. Schiehallion, sum er ein stratografisk fella.

Tí sigur Richard Hardman, at teir eru varðliga bjartskygdir. Teir vilja eisini vera realistiskir.

- Men hvat nú um allar tríggjar boringarnar í ár eru turrar?

- So hava vit fingið trý týðandi datapunkt. Vit kunnu arbeiða seismikkin av nýggjum og endurskoða hann. Vit vita, at tað eru reflektiónir frá onkrum í undirgrundini. Men vit kenna ikki veruligu orsøkina til tað. Summar av reflektiónum eru basalt, onkrar sillir men flestu teirra halda vit eru sedimentir. Vit vita, at olja og gass er framleitt her. Stóra óvissan er, hvussu fellurnar eru. Tá tú gert eitt fund, er sannlíkið fyri fleiri fund uppaftur størri. Tí tá kanst tú leita eftir líknandi tingum. Um allir brunnarnir eru turrir so mugu vit fara aftur til tekniborðið og hyggja eftir tilfarinum vit hava.

- Men eru tríggir turrir brunnar ikki sera negativ tíðindi at lata oljuheiminum?

- Vit mugu verja okkum ímóti tí. Vit mugu minnast til, at 76 brunnar vórðu boraðir áðrenn Foinaven oljufeltið varð funnið, og í Norra vórðu boraðir 20 brunnar áðrenn fyrsta lønandi fundið varð gjørt har.

Richard Hardman sigur, at søgan um oljuleiting á bretska landgrunninum er áhugaverd. Í byrjanini trúði man ikki uppá stór fund, men tá BG sum er partur av samtakinum fann olju á landi á sera stórum dýpi broyttist uppfatanin av møguleikanum at gera fund á djúpum vatni á Atlantsmótinum.

- Fella vit, sum leita í fátt og missa mótið, so verður einki funnið. Spurningurin er at vita, nær tú skal gevast. Vit hildu á vestan fyri Hetland, tá allir aðrir vórðu givnir við undantaki av BP. BP boraði Foinaven av tí, at vit funnu Strathmore og týðulig oljuspor. (Nakað eystan fyri Foinaven, blaðm.) Tað gjørdi, at BP fór víðari og fann Foinaven.

Richard Hardman viðgongur annars, at tað kann verða torført at at fáa onnur feløg at vísa føroyska økinum ans, um allar boringarnar í tí fyrstu útbjóðingini enda við at vera turrar. Men fleiri feløg eru longu her og tey vilja halda síni lyfti um at bora 8 brunnar í fyrstu atløgu. Men vit fara at ansa eftir ikki at tveita góðar pengar eftir vánaligum.

# Eingin orsøk til ótta

OLJA OG ÁRIN
*Jan Müller*

Um tað verða gjørd stór oljufund á føroyska landgrunninum, hvørja ávirkan heldur Richard Hardman, fráfarandi altjóða leitistjórin hjá Amerada Hess hesi kunnu fáa á føroyska samfelagið, nú arbeiði longu er til allar hendur og búskapurin er nógv upphitaður?

- Tá eg arbeiddi í Norra bóru mong ótta fyri útviklinginum. Tórshavn í dag minnir nógv um Stavanger, tá eg kom hagar í 1975. Fólk bóru ótta fyri teimum nógvu pengunum, sum skuldu floyma inn í samfelagið. Men hvat er hent. Norskur ídnaður hevur ment seg, og kring allan heimin eru norskar fyritøkur. Hetta ikki minst takka verið oljuvinnuni. Eg haldi norðmenn hava borið seg skilagott at, tá teir hava gjørt íløgur, og teir hava vunnið nógv uppá tað. Føroyingar, sum eru vanir at arbeiða hart og skilagott, fara at fáa eins nógv burtur úr.

- Vit síggja, at nógv er gjørt fyri at kanna umhvørvið, áðrenn boringin byrjaði, men tað eru fleiri, sum vísa á, at einki er gjørt fyri at kanna sosiala umhvørvið. Heldur tú, at myndugleikarnir hava misrøkt sína ábyrgd á hesum øki?

- Tað haldi eg ikki. Teir hava gjørt eitt gott arbeiði við at fyrireika leitingina, sum jú er grundarlagið undir øllum øðrum. Tað er skeivt at selja skinnið, fyrr enn bjørnin er skotin. Bíðið við hesum til tit hava fingið ta fyrstu bjørnina. Føroyingar hava góða tíð og eru ikki ov seinir á sjóvarfallinum. Finna vit olju í ár, so verður fyrsta oljan neyvan á marknaðinum fyrr enn í 2006.

Richard Hardman vísir á, at pengarnir fara ikki at streyma inn í samfelagið, fyrr enn framleiðslan rættiliga er í gongd. Hann ásannar, at tað fara at koma fleiri fólk til landið næstu árini men kortini er tað avmarkað. - Finna vit olju við Føroyar, verður myndin at líkjast nógv henni hjá Amerada Hess í Danmark.

Har eru vit umleið 60 fólk á Amerada Hess skrivstovuni. Alt annað verður gjørt av donskum feløgum. T.d. tekur Esbjerg Oilfield Service sær av at manna pallarnar. Kravið til manning í sambandi við at útvikla eitt oljufelt á landgrunninum hevði svarað til manningina á trimum stórum trolarum, harav ein stórur partur hevði kunnað verið føroyingar. Á landi høvdu tveir triðingar av manningini á skrivstovuni verið føroyingar. Eg haldi, at alt hetta hevði kunnað veitt ein vælkomnan møguleika í mun til fiskivinnuna, tá hugsað verður um at hava eitt alternativ eitt nú í verri tíðum. Eg haldi eisini, at royndir tykkara á sjónum høvdu kunnað komið sera væl við í hesi nýggju vinnuni.

Uppá fyrispurning hvat vil henda, um tað verða gjørd fleiri stór fund her næstu árini metir Steve Boldy, leitistjóri, at tað tá í fyrsta lagi vil vera eitt positivt problem. Men hann leggur tó aftrat, at tað er ikki bara sum at siga tað at fara undir at útvikla fleiri felt eftir stuttari tíð. -Tað hevði sjálvandi verið áhugavert at kunnað útviklað fleiri felt í senn, tí tað vil skapa nýggjar møguleikar, men taka vit royndirnar vestan fyri Hetland, so var risastóra feltið Clair funnið í 1978, og núverandi sær út til, at oljuframleiðsla kann byrja.

Steve Boldy vísir eisini til gongdina í Noregi, har tað eisini varð tjakast um, hvussu nógv olja skuldi takast upp frá byrjan. Tá varð gjørt av at taka oljuna upp og seta pengarnar í oljugrunnin heldur enn at lata oljuna vera verandi í undirgrundini at goyma til komandi ættarlið.

## Góð ráð

Richard Hardman, sum kom til Føroya fyrst í 90-unum at fyrireika seg til at leita eftir olju, heldur seg hava fingið gott innlit í samfelagið her og hugsanarháttin hjá fólkinum. Hann hevur hesi ráð at geva føroyingum: -Verið ikki ov spentir í byrjanini. Finna vit ikki olju beinanvegin so takið tað róligt. Føroyingar eru eitt sera pragmatiskt fólkaslag. Takið tingini, sum tey koma og latið vera við at taka tað, sum liggur longur frammi, ov tungt.

Fyrsti spurningurin er at finna oljuna. Næsti at hyggja eftir sosialu avleiðingunum. Triði at handfara inntøkurnar á ein slíkan hátt, at hetta ikki nervar og skaðar føroyska samfelagið. Eg trúgvi tit klára alt tað, tí tit hava ein ómetaliga stóran fyrimun. Hóast tit kunnu vera ósamdir um gongdina, tá tit tjakast, so veit eg, at tit megna at stýra gongdini. Tit hava bæði hegni, vilja og dirvi til tað. Hetta eru mínar royndir saman við føroyingum nú í skjótt 6 ár. Eg ynski tykkum alt tað besta.

Steve Boldy, nýggi stjórin fyri Føroyaøkinum, vísir til útviklingin í Hetlandi og Orknoyggjunum, har tey hava livað í stórari harmoni við oljuni í 25 ár. Bæði plássini hava havt oljuhavnir, hvørs virksemi ikki hevur nervað samfeløgini.

Ein av stóru spurningunum, um olja verður funnin, er, hvørt oljan skal í land í Føroyum ella hon skal flytast beinleiðis víðari til verandi oljuhavnir í eitt nú Hetlandi. Tann spurningin settu vit Richard Hardman, sum heldur hetta vera ein spurning um raðfesting. Hann ivast stórliga í um, vit vilja fáa størri inntøkur við at taka oljuna til Føroya enn til Sullom Voe í Hetlandi. - Vit hoyra, at tað er tørvur á arbeiðsmegi. Og skulu tit til at taka ímóti oljuni so mugu tit til at innflyta arbeiðsmegi at byggja eina oljuhavn. Er tað tað tit ynskja? Gloymið ikki at sveisarar vunnu sínar pengar uppá at taka gjald frá fólki at koma ígjøgnum landið. Um tit vilja lata oljuna fara til Sullom Voe heldur enn til Føroya og tit fáa meira inntøkur burtur úr tí, so hevði eg ikki ivast í tí.

# Landsstýrismaðurin má kannast

**Løgmaður eigur at kanna, um landsstýrismaðurin við almanna- og heilsumálum tók ósaklig atlit, tá hann lat alla gransking í Føroyum upp í hendurnar á yvirlækna, sum hevur persónlig áhugamál í granskingini, sigur løgtingsmaður**

GRANSKING
*Edvard Joensen*



*Kristian Magnussen, løgtingsmaður, vil hava løgmann at kanna, um landsstýrismaðurin við almanna- og heilsumálum hevur tikið ósaklig atlit, tá hann setti fólk at umsita granskingina í Føroyum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Kristian Magnussen, løgtingsmaður, heldur, at hetta er eitt mál, sum løgmaður eigur at koma uppí.

Hann vísir á, at løgmaður eigur at kanna, um landsstýrismaðurin og hansara fólk ganga við ósakligum ætlanum í hesum málinum.

Tað grundar hann á, at hann er vitandi um, at føroyskir granskarar uttanlands fyri meira enn einum ári síðan bóðu um loyvi at granska í ávísari sjúku í Føroyum.

Teimum varð víst til yvirlæknan, sum landsstýrismaðurin hevði sett at taka sær av málinum. Yvirlæknin svarar aftur, at tað verða eingi loyvi givin, fyrr enn lógarverk er gjørt.

Síðan hendir einki meira í málinum, sigur løgtingsmaðurin. Tað tykist, sum lok verður lagt á.

Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður við almanna og heilsumálum, boðaði í apríl frá, at eitt lógaruppskot fór at koma beint eftir ólavsøku, men tað er ikki komið enn. Og enn ganga føroysku granskararnir uttanlands og bíða eftir svari upp á umsókn, sum send varð fyri meira enn einum ári síðan. Teir vildu sleppa at halda fram við arbeiðið, teir vóru byrjaðir upp á uttanlands, men sum kravdi, at eisini varð granskað í Føroyum.

–Tí er hetta ein beinleiðis áheitan á løgmann um at hava eftirlit við landsstýrismanninum við almanna- og heilsumálum og kanna, um hann tekur ósaklig atlit, tá hugsað verður um gransking í Føroyum, sigur Kristian Magnussen, løgtingsmaður.

## Yvirlæknin ógegnigur

Kristian Magnussen er ikki í iva um, at yvirlæknin, sum Almanna- og Heilsumálastýrið hevur sett at umsita arvagranskingina í Føroyum, er ógegnigur.

Landstýrismaðurin við almanna og heilsumálum hevur ikki hugsað seg nóg væl um, tá hann setti fólk at umsita granskingina í Føroyum. Maðurin, sum hevur alt vald á granskingini, er ógegnigur, tí hann samstarvar persónliga við útlendskan granskingarstovn, sigur Kristian Magnussen.

Hann leggur dent á, at hansara viðmerkingar eru á ongan hátt nakað álop á yvirlæknan, talan er um. Maðurin hevur gjørt tað arbeiðið, hann er biðin um at gera. Men tað er landsstýrismaðurin, sum hevur biðið hann til arbeiðis, ið hevur hugsað sera stutt, sigur Kristian Magnussen. Yvirlæknanum er latið upp í hendur alt vald á føroyskari gransking í framtíðini.

## Málsviðgeri

Kristian Magnussen sigur, at tað tykist honum løgið, at landsstýrismaðurin við almanna- og heilsumálum, Sámal Petur í Grund, sigur við Sosialin, at yvirlæknin hevur havt tað lógarteknisk arbeiðið um hendur.

–Tað samsvarar ikki við tann veruleika, sigur Kristian Magnusen, at sami yvirlækni sendir svar upp á umsóknir frá útlendskum granskingarstovnum um at sleppa at granska í føroyskum arveginleikum.

Annað bræv, sami granskingarstovnur hevur fingið frá Almanna- og Heilsumálastýrinum, sigur, at stovnurin skal venda sær til hendan ávísa yvirlæknan. Og seinni hevur yvirlæknin so svarað upp á umsóknina.

–Tað merkir, at yvirlæknin beinleiðis er málsviðgeri og ikki bara situr og smíðar lógartekst, sum landsstýrismaðurin sigur, vísir Kristian Magnussen á.

## Monopol

Tá landsstýrismaðurin í Sosialinum tosar um ein almennan stovn, sum skal umsita granskingina í Føroyum, sigur hann ikki alt, sum frammi hevur verið, vísir Kristian Magnussen á.

Hann minnir á svarið, Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður, gav einum fyrispurningi í tinginum í apríl í ár.

Í tí svarinum verður róð fram undir, at avtala skal gerast við ein útlendskan granskingarstovn, sum so skal hava alla granskingina um hendur.

Landsstýrismaðurin skjýtur upp, at samstarvið kann skipast soleiðsi, at eitt partafelag verður stovnað við føroyskum og útlenskum pengum. Føroysku pengarnir skulu vera almennir, meðan útlendski granskingarstovnurin skal hava sín lut av partapeninginum. Tó skal meirilutin vera føroyskur.

Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður, sigur í svarinum, at hann kundi hugsað sær skipanina soleiðis, at hendan landsfyritøkan skal so umsita øll rættindi til diagnosur í føroyska heilsuverkinum.

Lagt verður afturat, at tað tó skal vera møguligt hjá einum og hvørjum, sum vil granska uttan peningalig áhugamál, at fáa atgongd til upplýsingar, sum hendan landsfyritøkan liggur inni við.

–Men hvat er so tað at granska uttan peningalig áhugamál? spyr Kristian Magnussen.

Hann tekur aftur í aftur, at tað tykist sær, at her er grund til at hugsa, at áður umrøddi yvirlækni ikki átti at verið so innblandaður, sum hann er í hetta málið.

–Tí tað er alment kent, at hann er í tøttum samstarvi við útlendskan granskingarstovn, og tað tí kann vera freistandi at blanda tingini saman. Maðurin er við ørðum orðum ógegnigur, staðfestir Kristian Magnussen, løgtingsmaður.

# Ternan siglir aftur

**Mánadagin byrjar Ternan aftur at sigla um Vestmannasund eftir at hava verið á sleipistøð í fimm vikur**

SAMFERÐSLA

Ternan, sum seinastu fimm vikurnar hevur verið á sleipistøð, fer nú aftur í rutusigling um Vestmannasund.

Heri Andreasen á Teknisku Deild hjá Strandfaraskipum Landsins, sigur, at Ternan hevur verið til vanligt eftirlit á Tórshavna Skipasmiðju. Umframt hevur hon fingið ísetta nýggja bjargingarútgerð. Ta sonevndu »Turrskødd bjarging« útgerðina.

Einki óvæntað hevur veirð at gjørt við Ternuna, upplýsir Heri Andreasen. Hon er yvirhálað og hevur skift lit. Nú er hon málað við nýggja, myrkabláa litinum, sum strandfaraskipini hava.

Nýggja bjargingarútgerðin varð ísett og roynd herfyri, og tískil lýkur Ternan tey trygdarkrøv, sum danska skipaeftirlitið ásetir.

Nú Ternan kemur aftur í sigling, fer gamli Sam, sum hevur røkt siglingina ímeðan, aftur at hvíla seg í Vestmanna. Sam er einasta tiltaksskipið, Strandferðslan hevur, sigur Heri Andreasen.

**ej**



*Nýggja bjargingarútgerðin umborð á Ternuni varð roynd í seinastu viku*

*Mynd: Poul Jákup Thomsen*